Grønlandstíðindi Kári við Stein

# Føroyskir fiskimenn veiða saman við ísbjørnum

GRØNLANDSTÍÐINDI

Kári við Stein sigur frá metkulda í Grønlandi. Í heimbýi hansara hevur verið ísbjarnaávaring! Hann greiðir frá dag fyri dag


Akamilik, har Jógvan Tróndarson er skipari

**3. februar**
Í dag eru – 17 stig og lot av norði. Ja, eitt er vist, at so nógvan kava, sum vit hava nú fyri tíðina, havi eg ikki upplivað í øll hesi ár, sum eg havi veri í Sisimiut. Alla staðir, har maskinur hava dosað kava upp í nógvar hæddir, eru bilar byrjaðir at koyra kavan fyri bakka, so tað ikki kemur at vera til hindurs, tá Várrharra setur varmaapparatið í gongd aftur.

Lómur kom inn til Pamiut i gjárkvøldi vid 120 tonsum. Teir hava roynt í 2 ½ døgn.

Teir rokna við at sleppa út aftur í morgin. Markus var eisini inni her í gjárkvøldið. Har var okkurt smábrek, sum teir fingu orðnað beinavegin. Teir loystu eftir einum tíma.

**4. februar**
Í dag er stilli og -18 stig. Ísurin er inni ímóti landi aftur. Hann segði í radioavísini í dag, at tað er ongin sigling við ferðafólki til nakra bygd norðanfyri fyri ís. Men teir skuldu royna at sleppa igjøgnun við farmi.

Qaqatsiaq kom inn til Nuuk í morgun at landa og skifta fólk. Í morgin kemur Polar Qrasiut til Nuuk at landa og skifta fólk.

**7. februar**
Í dag eru – 26 stig og stilli, men tjúkt í veðrinum. Lómur kom inn til Pamiut at landa í morgun. Teir hava 105 tons inni. Teir skuldu sigla aftur í kvøld. Natarnaq kom inn til Nuuk at landa í morgun og skifta fólk. Tarsermiut kom inn til Nuuk fyrr í vikuni vid ymiskum maskintrupulleikum. Teir koma nokk at liggja vikuna út. Annunguaq II kom higar í dag eftir tveimun skipum frá sama reiðarí. Hann skuldi bróta ísin fyri teimun, so teir kunna sleppa at fiska rækjur suðuri vid Pamiut. Eg sá teir fara suður eftir í konvoy í kvøld um kl 2100. Tað vóru Annunguaq II, Karina E, Theodora B og Ittut.

**10. februar**
Í dag eru – 31 stig og stilli. Ja, hesir síðstu dagarnir hava verið kaldir. Vit hava verið niðri á –33 stig. Tað er tó gott, at tað er stilli, tá tað er so kalt. Søgur siga, at teir sum fóru hiðani hóskvøldið, vóru komnir í morgun suður í móti Kangamiut nakað norðanfyri Manitsoq, og har eru ístrupulleikar. Ocean Tiger var inni í Nuuk í dag og bunkraði. Teir loystu seinnapartin og stevndu til Eysturgrønland aftur. Søgur siga, at teir føroysku bátarnir har hava brúkiligt fiskarí, tá ið teir sleppa framat fyri ísi. Ja, ísur er nokk av fyri tíðina. Tað fer at vera eini 15 ár síðani, at tað hevur verið landfast ímillum Kanada og Grønland. Men tað er støðan, sum nú er. Eg tosaði við ein bát í gjárkvøldið. Har varð sagt, at ísbjarninar gingu rundan um skipið. Summar koma heilt nær, og aðrar hildu seg longri burtur.

**11. februar**
Í dag eru – 30 stig og stilli. Akamalik kom inn at landa í morgin. Teir hava gott og væl 500 tons inni. Teir hava sett siglitíð í morgin tíðliga. Polar Nagtoralik er inni í Nuuk og landar, og Mano skuldi landa í morgin.

Í heyst skrivaði eg um tríggjar serligar kavafannir, sum eru norðantil á Kjellingahettini. Um tær tvær svunnu um summarið, so bleiv tað ein kaldur vetur. Tað var tað, sum teir gomlu her í Sisimiut hildu seg eftir. Men tað svunnu tríggjar fannir í alt í summar. Tað bleiv spennandi at bíða til veturin kom at síggja, hvat úrslitið bleiv burtur úr fonnunum. Ja, eitt er so vist, at her er komin ein øgiligur kavi niður í vetur og fyri ikki at tala um kulda hesa seinastu tíðina. Hesar seinastu dagarnir hevur kuldin ligið frá – 38 stig til -31 stig. Tað er eisini munur á ymsa staðni í býnum. Tað er seks stig á muni hjá okkum, sum liggja við sjógvin og longri uppi í býnum.

**12. februar**
**Ov kalt at landa og bjarnaávaring**
Í dag eru – 30 stig og stilli. Akamalik bleiv ikki liðugur at landa fyrr tíðliga í morgun. Har var nógv sortering, og so var ov kalt hjá landingarfólkinum at landa. Tað vóru – 38 stig í nátt, og eftir arbeiðsreglunum hjá arbeiðarafelagnum SIK er ikki loyvt at arbeiða, tá tað er kaldari enn – 30 stig, so tað nógva fólkið fór til hús í nátt. Men teir sigldu nakað undan middag. Eitt veit eg, og tað er, at Akamalik hevur ongantíð siglt út úr Sisimiut í so nógvum ísi. Lómur kom inn til Pamiut í morgun at landa. Teir høvdu um 100 tons inni. Teir loystu longu aftur í kvøld nýggjan túr. Sum teir siga eru ongar rækjur at fáa við kaikantin.

Aftan á, at eg hevði fest hesar reglur niður, segði okkara lokala radio, sum vit hava her, at tað var frá politinum komin ein ávaring, og hon ljóðaði soleiðis: ”Isbjørneadvarsel for Sisimiut by.” Tað skuldu vera sæddar seks ísbjarnir her um okkara leiðir, og løgreglan var bangin fyri, at onkur kundi finna uppá at koma inn í býin at finna sær føði, tí tann dagin var nógvur ísur her um okkara leiðir.

Sisimiut hevur verið inni í Noreg og landa. Teir høvdu um 400 tons inni.

Regina C. hevur verið í kanadiskum sjógvi og roynt. Teir áttu eina kvotu har. Hana hava teir so fiskað og eru komnir aftur í grøndlendskan sjógv at royna. Teir skulla inn Nuuk at landa í morgin 13. februar, og tað sama skal Polar Amaroq.

**13. februar**
Í dag er -11 stig og stilli. Nú er so allur ísurin í sori og siglandi er aftur suður og norð. Einir fýra trolarar liggja nú aftur í Holsteinsborgdýpinum og royna. Tarsermiut liggur framvegis í Nuuk. Tað ganga nokk nakrir dagar, áðrenn hann verður klárur at sigla.


Ísbjarnir tiknar av Akemilik nakað uttanfyri Sisimiut